# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein vón og eitt vónbrot

Tað var ikki sørt av eini kollvelting, tá ið Tony Blair fyri tíggju árum síðan gjørdist forsætisráðharri Bretlands. Frammanndan hevði hann broytt arbeiðaraflokkin Labour heilt frá botni av. Hann broytti flokkin frá at vera ein flokkur á marxistiskum støði við sterkari fakfelagsávirkan til ein nútímans flokk í miðjuni í bretskum politikki. Betri enn nakar annar skilti Blair, at í tí Bretlandi, sum Margareth Tatcher hevði skapað, hevði ein reint sosialistiskur arbeiðaraflokkur ongan møguleika fyri at koma fram at valdinum.

Hetta elvdi til New Labour, tann nýggja arbeiðaraflokkin, ið legði dent á nútímansgerð av øllum samfelagsins liðum. Í fyrsta valskeiðinum hendi lítið og einki. Blair og New Labour skuldu finna síni bein og sín form – øll tann nýggja ideologiin skuldi setast í verk og hetta var ikki sum at siga tað. Men so kom annað valskeið og ferð kom av álvara á nýskipanararbeiðið og tað við lít. Heilsuverk, almannaverk og útbúgvingarskipan – alt var umskipað til eitt nútímans humant og vælvirkandi vælferðarsamfelag. Minstaløn og sosialur bústaðarpolitikkur tryggjaðu teimum lægstløntu sømilig lívskor. Skotland fekk sjálvstýri og gongd varð sett á friðartilgongdina í Norðurírlandi, sum loksins endaði í øllum góðum fyri bert einum mánað síðan. Samstarv millum privata vinnulívið og statsvaldið til gagns fyri báðar partar var eisini eitt nýtt fyribrigdi í Bretlandi. Samantikið eitt politiskt bragd alt samalt, og Blair livdi upp til allar tær vónir, sum hann hevði birt í størsta partinum av bretsku tjóðini.

Men so kom vónbrotið. Yvirgangsatsóknin tann 11. september í New York, sum vendi upp og niður á so mongum av heimsins viðurskiftum, vendi eisini upp og niður á heimsmynd Blairs. Hetta rak hann í føvningin á Bush, og var hetta byrjanin til endan á eini glæsiligari politiskari starvsleið. Hví ein so vitugur og lærdur maður sum Blair læt seg blinda av Bush er fyri teimum flestu ein gáta. Sama ger, politiska partrolingin við Bush og luttøkan í álopinum á Irak elvdi til eitt katastrofalt fráfall hjá Labour. Tann sterka undirtøkan er burtur og hevði val verið í dag, hevði konservativi flokkurin volað. Blair, sum byrjaði við at gerast vónin hjá tí unga ættarliðinum í Bretlandi, hjá øllum á lívsins skuggasíðum og hjá teimum, sum vildu eitt nútímansgjørt Bretland, gjørdist eitt vónbrot og at enda hevði hann einki val uttan at leggja frá sær.

**Sosialurin**

## Tunlar og atkvøður

**TRÍGGJAR KONUR Í DALI**
Bergljót av Skarði

Í farnu viku høvdu fólkafloksfólk fund heima á Sandi. Millum annað var til umrøðu tunnilsgerð í oynni og til oynna. Tað frættist, at fundurin kom til ta niðurstøðu, at doyur skal leggjast á at fáa undirsjóartunnilin til Sandoynna í gongd heldur enn at raðfesta tunnilin ímillum Húsavík og Dal. Fólkafloksfólk í Sandoynni hildu, at tað skuldi bíða! Fólkaflokkurin er ímóti tunli til Dals? Og fólkaflokkurin ræður í Føroyum.

Hesir báðir tunlarnir eru heilt hvør sítt mál og hvør sítt projekt. Tunnilin til Dals hevur verið í umbúna í mong harrans ár. Fyrireikingar eru gjørdar, uppmátingar, vegaføring osfr., brøv eru send til eigarar í bønum í Húsavík og Dali, og ja lesarin kann gita sjálvur, hvar í bønum hundurin er grivin.

Undirsjóartunnilin er eitt nógv nýggjari hugskot, føtt av tí eufori, sum fylgir hinum báður undirsjóartunlunum. Ivaleyst eitt nógv meiri prestigufylt og atkvøðugevandi projekt. Øll oyggin fer at brúka undirsjóvarfarleiðina, bara nakrir fáir dalbingar og teirra gestir eru í lívsvanda á dalsvegnum, og hvat so.

Sama dag sum Jógvan Adolf Johannessen, lærari og tingmaður fyri javnaðarflokkin, fór til gravar í Dali, var vørubilur á veg til Dals. Hann kom ikki longur enn til Húsavíkar, vøran bleiv sett av í Húsavík, tí at bilurin torgaði ikki suðurum. Summi av teimum sum vóru og fylgdu Jógvani søgdu, at hetta var síðstu ferð tey vóru í Dali, so óhugnaligt var at koyra í berginum. Nógv tingfólk vóru og fylgdu, løgmaður og konan vóru og fylgdu, tey hava sjálvi sæð, hvussu vegurin sær út. Ongin steinur kom á vegin tann dagin, eingin skriða leyp undan ytra vegjaðara, meðan líkfylgið var á veg til Dals. Tíbetur.

Í síðstu viku kom ein stórur klettur niður á vegin, hevði ein bilur tá verið undir, so fór hann í knús. Eg ætlaði at síggja steinin, øll tosaðu um, nei landsverk varð boðsent og beindi hann burtur beinanvegin. So at siga beindi prógvið burtur. Nei, teir skuldu lagt hann til framsýningar, kanska á tinghúsvøllin í Havn.

Vegurin til Dals er ein deyðsfella, teir snakka um at fjallatryggja vegin, skula teir so eisini skriðutryggja niðanfyri ? Spyr tey, sum sigla við Smyrli framvið, hvussu lendið undir vegnum sær út? Kanska dalbingar skula fara at ganga til Húsavíkar og bera vørur og tilfar á nakkanum?

Menningin í Sandoynni er komin á breddan við vónini um undirsjóartunnil. Hús verða bygd og umvæld og keypt og seld í Skálavík, Húsavík og aðrastaðni. Dalur fær ikki lut á sama hátt í hesi menning, so leingi sum vegurin gjøgnum bergið er einasta farleið! Tey fáa nóg illa vørur og tilfar til bygdina, og gestir senda avboð, tí at tey tora ikki suður - í 2007.

Ferjulegan á Gomlurætt er nýggj, spildurnýggj bilferja er bygd, tað tekur onga tíð at sigla um Skopunarfjørð. Helvtin av sandoyingum arbeiðir í Havn, ferðast hvønn dag og hugsa einki um tað. Gerið nú tað fyrsta fyrst, "first things first", Skopunarfjørður er raðfestur, tá sluppu vit undan Kirkjubønesi og Rituni, Dalstunnilin stendur fyrstur fyri nú.

## Nýggj vallóg

**ZAKARIAS WANG**



Nú verður umrøtt at vit skulu hava eina nýggja vallóg fyri løgtingsval.

**Hvør skal gera hana?**
Tað eru veljararnir, sum gera av, hvør ið skal sita í tinginum. Tí er tað greitt, at tað ikki kunnu vera tingmenn, sum gera vallógina, tí tá er vandi fyri, at teir leggja størri dent á tað, sum er til egnan fyrimun, heldur enn tað, sum veljararnir halda hava týdning.

Ein vallóg skal tí verða samtykt av fólkinum á eini fólkaatkvøðu.

**Rættvís lokal umboðan**
Fyrsta kravið, ið skal setast til eina vallóg, er at ymsu partarnir av landinum fáa ta røttu umboðanina í mun til fólkatalið. Hetta kann bert fáast í lag við at landið verður býtt sundur í eins nógv valdømi og tað eru tingmenn. Tá fáa allir landslutir ta umboðan, tey hava uppiborið, og hvør atkvøða telur eins nógv.

**Rættvís kynsumboðan**
Í dag er óhugsandi at hava eina vallóg, sum ikki tekur hædd fyri at bæði kynini hava ta røttu umboðanina á tingi. Hetta kann ikki fáast í lag uttan at sett verður í vallógina, at eins nógv valdømi verða umboðaði av kallmonnum sum av kvennmonnum.

**Uppskot**
Tað uppskot, sum skal fara til fólkaatkvøðu, kundi tí verið orðað soleiðis:

"Á løgtingi eru 33 umboð.

Tey verða vald við meirilutavali í einmannavaldømum við einari atkvøðugreiðslu.

Tann elsti fyrrverandi ella verandi sorinskrivarin setur mark millum valdømini, soleiðis at hvørt av teimum hevur umleið 1/33-part av íbúgvatali landsins.

Tíggjunda hvørt ár skal tann elsti fyrrverandi ella verandi sorinskrivarin endurskoða markini millum valdømini og broyta tey í tann mun, tað er neyðugt fyri at tryggja, at hvør atkvøða hevur eins nógva tyngd.

Tá henda lóg er komin í gildi, skipar tann elsti fyrrverandi ella verandi sorinskrivarin fyri lutakasti um, hvørji valdømi velja kallmann og hvørji velja kvennmann."


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.



**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.